## NSÍ-B36 1-0 (1-0):

# eisini triðju royndina



*Alex dos Santos hevði nakrar góðar skotroyndir, men tað var ov sjáldan, at B36 megnaði at spæla seg fram til teir opnu møguleikarnar móti NSÍ, sum við triðja sigrinum á rað hevur otað seg heilt fram í heiðursmerkjastríðið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Ongar tenn**

B36 hevði ávísar trupulleikar fyrstu løtuna. Tá ið fyrsta korterið var farið, skiftu Fróði Benjaminsen og Klæmint Matras um. Fróði fór úr miðverjuni og á miðvøllin. Á Skála skiftu teir eisini um, men tá var tað Klæmint, sum flutti fram á miðvøllin og Fróði, sum flutti aftur í miðverjuna.

Umbýtingin hesa ferð hevði somu ávirkan, sum tann á Skála hevði. B36, sum saknaði heilt nógv smáskadda Inga Højsted, gjørdist bóltførandi so at siga alla tíðina, og í longum løtum í fyrra hálvleiki fór bólturin bara av NSÍ hálvuni, tá ið teir í B36 royndu at fara undir enn eina álopsuppbygging og í tí sambandinum tóku Jákup Mikkelsen og Pól Thorsteinsson við í royndina.

Bestu B36 royndina undan steðginum átti Santos, sum var mest kreativi hvíttklæddi maðurin við Løkin. Eftir at B36 í fitta løtu hevði havt álop inni í NSÍ brotsteiginum, legði Mikkjal Thomassen upp á tvørs til Santos, sum smekkaði til úr tíggju metra fjarstøðu og við nógvum fólki millum seg og málið. Bólturin brast í stólpan vinstru megin Jens Martin Knudsen, sum kanska fekk stundir at fylgja við, tá ið bólturin snúraði millum hann og málstrikuna og fór út til málspark í mótsatta borðinum!

Trý tey síðstu korterini snúði tað hjá NSÍ seg um at halda tørn. Stóra B36 yvirvágin bar við sær, at tað nógva gekk fyri seg á ikki serliga stórum øki, men uppløgdu málmøguleikarnir kundu meiri enn so teljast á aðrari hondini - um talan yvirhøvur var um upplagdar møguleikar.

Tá ið so nógv gongur fyri seg á so lítlum øki, so eiga amboðin at vera eitt nú at spæla skjótt eitt tvey mitt fyri, við yvirlappum at spæla seg til baklinjuna fyri at leggja innfyri, at bjóða av ein móti einum í brotsteiginum og harvið dyrgja eftir brotssparki og at royna við skotum úti frá, sum møguliga kunnu taka í onkran og harvið broyta kós og snýta málverjan.

Ivaleyst ætlaðu teir í B36, sum ofta hava víst seg sum góðar spælarar, at nýta øll hesi amboðini fyri at fáa eina málið, sum eftir øllum at døma væl kundi havt borið fleiri við sær, men tað eydnaðist ikki. Heldur gjørdist talan um bóltflytingar, sum ikki skeiklaðu verjupartin hjá NSÍ, har Helgi L. Petersen ofta var millum teir aftastu.

Klokkan gjørdist alt størri mótstøðumaður hjá B36, og síðstu løtuna gjørdist tað nógv til illneiting inn á dómaran, sum - burtursæð frá gula kortinum til Fróða Benjaminsen - kom stak væl frá uppgávuni.

Oby hevði fínan stútara á Jens Martin eftir horna, og Santos hevði tvær fínar skotroyndir úti frá, sum góvu Jens Martini Knudsen møguleikar at vísa, at tað framvegis er dugur í honum. Hann helt tætt, B36 tapti, og enn eina ferð var tað við máli hjá Páll M. Joensen, at NSÍ fekk fult og harvið av álvara legði seg út í kappingina um heiðursmerkini.

## FAKTA UM DYSTIN

**NSÍ-B36 1-0 (1-0)**
1-0: Páll M. Joensen 3.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Viggo Johannesen, Einar Hansen (Andy Olsen, 66.) - Páll M. Joensen (Kári Hansen, 73.), Dánial Hansen, Jústinus R. Hansen (Sjúrður Jacobsen, 76.), Jónstein Petersen - Christian Høgni Jacobsen, Helgi L. Petersen
**Gult kort:** Sjúrður Jacobsen
**B36:** Jákup Mikkelsen - Kenneth Jacobsen (Bogi Hermansen, 70.), Fróði Benjaminsen, Pól Thorsteinsson, Alex Santos - Niels Joensen, Klæmint Matras, Mikkjal Thomassen - Allan Mørkøre, Oby (Thomas Hans Rubeksen, 79.), Bergur Midjord (Levi Hanssen, 74.)
**Gult kort:** Fróði Benjaminsen, Allan Mørkøre

## Tølini høvdu alt at siga

**NSÍ venjarin ásannar, at leikliga avrikið kundi havt verið meiri sannførandi, men hann heldur, at hansara lið ofta hevur verið í tí støðuni, at teir hava spælt væl, men kortini einki fingið burturúr**

NSÍ
*Jóannes Hansen*

Tað gongur sum eftir ánni hjá NSÍ. Setningurin hjá teimum var í summarsteðginum at vinna tríggjar teir fyrstu dystirnar eftir summarsteðgin. Um tað eydnaðist, so vóru teir við í FM kappingini.

Nú eru trý tey fyrstu umførini eftir summarsteðgin løgd afturum bak, og NSÍ hevur fingið fulla úrtøku. Móti KÍ og B36 hava teir vunnið 1-0, og móti HB vunnu teir 2-1.

- Hesa ferð kundi leikliga avrikið havt verið betri. Vit vóru kroystir síðsta tíman, men tað er positivt, at vit megnaðu at halda tørn. Spælararnir skulu eiga rós fyri, at teir sýndu góðan hugburð. Vit hava ofta verið leikliga omaná og einki fingið burturúr. Hesa ferð var tað øvugt, og nú sær tað hampuliga ljóst út hjá okkum, heldur NSÍ venjarin.

*Hvat segði tú við tínar spælarar í steðginum?*

- At nú vóru bara trý korter eftir at próvtøkuni, sum vit í summarsteðginum høvdu sett okkum sjálvum. Spælararnir vistu væl, at tað var rættuliga avgerandi fyri, hvussu áhugavert heystið verður, at vit fingu fult móti B36, og teir stríddust sum leyvur.

*Hvussu verður nú?*

- Vit taka eina viku í senn. Nú fokusera vit á ferðina til Suðuroyar. Vit hava fleiri ferðir havt trupulleikar, tá ið vit hava spælt móti TB. Nú eru teir í vandamiklari støðu, og eg ivist onga løtu í, at teir fara at leggja nógv fyri móti okkum. Men tað er í sovornum støðum, at tað er møguleiki at vísa, hvør dugur er í liðnum, og eg havi stórt álit á mínum spælarum, at teir fara at megna at stríða seg til gott úrslit á Sevmýri. Men teir vita væl, at tað skal arbeiðast og stríðast fyri søkini, heldur væl nøgdi NSÍ venjarin, Trygvi Mortensen.